# HÄNDELS MESSIAS



G. Fr. Händel ( 1685 – 1759) skrivaði í 1741 oratoriið MESSIAS fyri soli, kór og orkestur - eitt verk, sum ikki bert er at meta sum tað mætasta úr hansara hondum, men sum longu frá byrjan varð lýst sum “the finest Composition of Music that ever was heard ”, og sum í meira enn hálvatriðju øld hevur varðveitt sín tónlistarliga frískleika og enn dagin í dag eigur tokka millum fólk kring allan heim meira enn nakað annað skrivað tónaverk.

Eftir tíðarbil við týnandi mótburði í sínari tilveru, raknaði meistarin við eftir heilsustrik, og í religiøsum eldhuga og við inniligum takksemi fyri endurvunna jarðarlívið og fyri frelsuna fyri framman skapti hann eftir bert 21 døgum, har hann lítið og onki svar og nóg illa tók føði til sín, henda út í triðja tíma langa lovsong til Hin Altvaldandi – eitt bragd, sum listarsøgan neyvan veit annað dømi um, og sum Stefan Zweig so kveikjandi lýsir í bók síni “Mannaættar stjørnuløtur.”

Tað var tó ikki bara so hissini burtur úr serstakari lagnuløtu, at meistarin soleiðis hugfangaður fór til verka. Tekstin til verkið hevði hann sjálvur frammanundan sett saman burtur úr gamla og nýggja testamenti. I flestu av kirkjuligu tónaverkum Händels er tað søga Ísraels, ið verður lýst, so sum heitini eisini geva til kennar: “Esther”, “Deborah”, Samson”, “Joshua”, “Saul”, “Judas Maccabæus” og fleiri onnur. Men “Messias” hevur sína serstøðu. Her snýr tað seg ikki um at lýsa trupulleikarnar hjá einstøkum persónum, ella hvussu eitt einstakt fólk, Ísraels fólk, verður fríað úr trongd og neyð. Nei, hetta er ein boðskapur um, hvussu øll mannaættin verður loyst frá synd og trega og reist upp á evsta degi. Skiftandi teksturin við sínari musikalsku íklæðing lýsir søgu Krists frá fyrijáttan, føðing, lívi, deyða og fram til uppreisn.

Ár eftir ár varð “Messias” framført undir tónaskaldsins leiðslu fyri stúgvandi fullum kirkjum og konserthøllum, og 8 dagar, áðrenn hann doyði, varð tann blindi og likamliga avmaktaði meistarin leiddur fram at framføra hetta sítt yndisverk. Enn í dag kennist hátíðarstundin mikil víða um heim, tá ið máttmikla Halleluja-kórið lyftir lurtandi mannfjøldina úr sæti, eins og tað gjørdi á frumframførsluni í Dublin í 1942.

Havnarkórið og Suð framføra MESSIAS í Christianskirkjuni nú leygardagin kl. 17.00 og í Norðurlandahúsinum sunnudagin kl. 16.00.

Atgongumerkir til konsertina sunnudagin – 200 kr. vaksin og 50 kr børn upp til 14 ár – eru at fáa í Norðurlandahúsinum og í Kunningarstovunum í Havn og í Runavík.

Í Klaksvík verður høvi í kirkjuni at stuðla tiltakinum við einum íkasti.

# Um solistarnar

### Sopranin Helena Dearing



er fødd í New York. Sum barn flutti hon við familju síni til Eysturríkis, har hon fekk sína tónleikaútbúgving á Wiener Musikhochschule.

Í 1980 hevði hon sína fyrstu sangframførslu, og seinni hevur hon sum solistur havt hópin av konsertum í flestållum londum í Europa, eins og hon eisini hevur gjørt konsertferðir eitt nú til Japan og USA.

Sangúrvalið hjá Helena Dearing fevnir um tónleik frá barokktíðini, sum hevur hennara serliga áhuga, og upp til nútíðar songlist.

Umframt sítt konsertvirksemi er Helena Dearing eisini professari í sangi við lærda tónlistaskúlan í Wien.

### Altsangarin Elsa Súsanna Dalsgaard



er vælkend í klassiska tónleikaheimnum her á landi. Hon leyk prógv sum sangari á Det kgl. Danske Musikkonservatorium í Keypmannahavn og hevur síðan 2000 havt fast tilknýti sum kórsangari í norsku operuna í Oslo.

Í hesum starvi hevur hon mangan eisini havt solistuppgávur eitt nú í Requiem eftir A. Schnittke, S. Rachmaninoffs Vesper, Stabar mater eftir G.B. Pergolesi, La Traviata hjá G. Verdi og Dido & Aeneas eftir H. Purcell.

Heima í Føroyum hava vit upplivað Elsu Súsonnu bæði á egnum konsertferðum og sum luttakandi í Summartónum. Í samarbeiði við Havnarkórið hevur hon eisini sett sín ljómandi dám á sum solistur í verkum sum Magnificat og Jólaoratoriinum eftir J.S. Bach, Händels Messias og Elias eftir Mendelssohn-Bartholdy

### Tenorurin Johan Christensson



er í seinni árum vorðin viðurkendur sum ein hin fremsti konsert- og oratorisangarin við virksemi bæði í heimlandinum Svøríki og uttanlands.

Seinasta ár var hann at hoyra í Stockholms Konserthus sum solistur í c-moll messu Mozarts, sum Allan Gilbert stjórnaði. Saman við gitna svenska kór- og orkesturleiðaranum Eric Ericsson framførdi hann H-moll messu Bachs í Stockholm, Gøteborg og Norrkøping. Saman við Stefan Parkman var hann í Stuttgart og framførdi Magnificat eftir nútíðar tónaskaldið Sandstrøm, eins og hann eisini hevði evangelistpartin í Jóhannespassión J.S. Bachs í Malmø Konserthus.

Seinni í vetur gongur ferðin til Nidaros Dómkirkjuna í Tróndheimi og til Helsingborg Konserthus at framføra Händels Messias og Jólaoratorium Bachs, sum eisini við honum sum evnagelisti verður at hoyra í Stockholms Konserthus við Paul Goodwin sum leiðara.

Samanumtikið ferðast Johan Christensson víða bæði burturi og heima til týðandi sololeiklutir bæði tí klassiska og tí nútíðarliga.

### Ágúst Ólafsson, bassbariton,



fekk sína byrjandi sangútbúgving í heimbýnum Reykjavík. Framhaldandi lærdi hann í Sibelius Akademiinum í Helsinki hjá Jorma Hynninen og Sauli Tillikainen. Samstundis søkti hann sær lærdóm í Týsklandi á skeiðum hjá heimsgitnu sangarunum Elisabeth Schwarzkopf og Dietrich Fischer-Diskau.

Ágúst hevur havt solokonsertir í Íslandi, Noreg, Svøríki, Finlandi og Týsklandi. Í altjóða sangkapping á Hugo Wolf Akademiinum í 2004 vann hann aðru virðisløn saman við pianistinum Izumi Kawakatsu.

Í operusangi hevur Ágúst Ólafsson havt gitnar leiklutir sum Don Giovanni og sum greivin í Brúdleipi Figaros í hesum operum Mozarts og sum Don Carlos í operu Verdis.

Annars er Ágúst javnan solistur í oratorium Bachs og Händels, og seinasta vár upplivdu vit hann sum bass-solist í Mozarts Requiem í Norðurlandahúsinum og í Christianskirkjuni saman við Føroya Symfonikóri og –orkestri, sum Bernharður Wilkinson stjórnaði.